# Kjak



Ingeborg Vinther

## Ágangurin móti fiskavirkisskipanini

*Fiskavirkisskipanin varð gjørd sum stuðul til tey sum arbeiða á fiskavirkjum okkara, og sjálvt um skipanin verður missbrúkt av nøkrum arbeiðsgevarum, so eigur skipanin ikki at verða avtikin*

Bæði formaðurin fyri búskaparráðnum og landsstýrismaðurin í vinnumálum hava nú alment verið úti og funnist at fiskavirkisskipanini hjá Arbeiðsloysisskipanini, og báðir hava meira ella minni beinleiðis sagt, at skipanin í verandi líki eigur at verða avtikin ella niðurlagað.

Hvørki formaðurin fyri búskaparráðnum ella landsstýrismaðurin hava tó nevnt nakað um hvørjar avleiðingar hetta vildi havt fyri tey fólk, sum arbeiða á føroysku fiskavirkjunum.

### Fiskavirkisskipanin varð gjørd fyri at tryggja arbeiðsfólkinum á fiskavirkjunum

Tá fiskavirkisskipanin varð sett á stovn, tá var greitt, at neyðugt var at hava eina serskipan fyri tey arbeiðsfólk, sum arbeiða á føroysku fiskavirkjunum.

Hetta varð gjørt við, at hesi arbeiðsfólk skuldu tryggjast í minsta lagi 32 tímar stuðul um vikuna, svarandi til 4 arbeiðsdagar.

Skipanin hevur sum heild virkað væl, hóast útrokningargrundarlagið ger, at stuðulin hjá nógvum arbeiðsfólkum als ikki er nøktandi.

### Møguligt missbrúk frá arbeiðsgevarum er ikki grundgeving fyri at avtaka fiskavirkisskipanina

Vit hava tíverri dømi um, at ávísir arbeiðsgevarar brúka skipanina á ein hátt, sum hon ikki varð ætlað.

Slík missbrúk kunnu tó ikki brúkast sum grundgeving fyri at avtaka fiskavirkisskipanina, men í staðin eiga stig at verða tikin til at forða fyri slíkum missbrúki.

### Um fiskavirkisskipanin verður avtikin, so fer tað at fáa álvarsligar avleiðingar fyri hundraðtals familjur í Føroyum.

Eg skal gera púrasta greitt, at um fiskavirkisskipanin verður avtikin, so fer hetta at raka tey lægstløntu í landi okkara serstakliga hart.

Tað er átaluvert, at hvørki formaðurin fyri búskaparráðnum ella landsstýrismaðurin tekur upp á tungu tær avleiðingar, ein avtøka av fiskavirkisskipanini fer at hava.

Hetta er tó tíverri ikki eindømi um, at okkara embætisfólk og politikarar koma við útmeldingum um tiltøk, sum koma at raka vanliga løntakaran hart, og hesi fólk tykjast ikki at hugsa um hvussu vanligi føroyski løntakarin hevur tað, og at hesir løntakarar ikki tola enn meira skerjingar í rættindum teirra.

### Fastlønarsáttmálin

Nú Vinnuhúsið hevur ført fram alment, at fastlønarsáttmálin ið varð gjørdur 1. Mai 2010 við arbeiðarafeløgini, skal brúkast ístaðinfyri fiskavirkisskipanin, so skal eg minna Vinnuhúsið á, at hesin sáttmáli kann sigast upp til komandi samráðingar og fara heilt úr gildi.

Vinnuhúsið er fari at blanda tingini saman, hvussu skalt tú brúka ein sáttmála ístaðinfyri fiskavirkisskipanina. Um fastlønarsáttmálin skal brúkast/misbrúkast, so koma tey sum arbeiða í fiskivinnuni á landi ongantíð at fáa eina fulla mánaðarløn, tí teir tímar ið mangla í fulla tíð verða frátrektir í mánaðarlønini við upp til 10 % tvs at tá lítil rávøra er og nógvir dagar har onki arbeiði er, veksur tímatali sum arbeiðsfólki kemur at skylda til virkini, sostatt verður ongantíð full løn útgoldin.

Hetta var als ikki ætlanin við fastlønarsáttmálanum fyri fiskavirkini, sáttmálin var ætlaður at vera fyri virkir sum hava støðugt arbeiði, men ikki eingang tey virkini hava brúkt sáttmálan.

So nú skal hesin sáttmálin ikki brúkast sum arnboltur fyri at fáa fiskavirkisskipanina burtur.

Lat tað vera heilt greitt fyri teimum sum eru farin í herna móti fiskavirkisskipanini, at so leingi onki annað alternativ er fyri hesa skipan, skal hon ikki avtakast.

Fiskavirkisskipanin er ikki ein stuðul til fiskavirkini, men til arbeiðsfólkini á virkinum tá ongir lønartímar eru.

### Fakfelagsrørslan eigur at standa saman um fiskavirkisskipanina

Mín áheitan til fakfeløgini í Føroyum er at standa saman um fiskavirkisskipanina, tí um vit ikki standa saman so er vandi fyri at ein skipan, sum tryggjar arbeiðsfólkinum rímulig lønarkorð verður avtikin, uttan at okkara politikarar hugsa um hvørjar óhugnaligar avleiðingar hetta fer at fáa fyri vanliga løntakaran.

Marjun á Plógv

## Skelkað av Aksel

Hoyrdi fríggjadagin á døgurða landsstýrismannin í heilsumálum um hansara sjónarmið um ergoterapi. Eg má siga, at eg varð skelkað. Hann veit lítið, hvat hann tosar um. Tosar um misbrúk og ger seg klókan uppá, hvør skal fáa viðgerð og hvør, ið ikki skal fáa.

Havi arbeitt sum pedagogur í nógv ár við fólki, sum hava brek bæði innan menningatarnaði og sálarliga sjúk.

Eg havi eina ommudóttir, sum hevur brek. Hon hevur fingið ergoterapi-viðgerð einaferð um vikuna í nógv ár umframt fysiuterapi og ríðing, og hon kann ikki vera hesar viðgerðir fyri uttan. Hetta er ein neyðugur partur av menningini. Hon hevur eisini havt stuðul í skúlanum øll árini, og hevur tað gingið væl. Hon hevur kent seg sum ein partur av flokkinum, og hevur luttikið í sosialum tiltøkum saman við sínum floksfeløgnum – og, hetta tí hon hevði stuðul.

Nú er eingin stuðul meira, so nú er hon avskorin frá øllum sosialum tiltøkum. Er hetta rætt? Er skúlin ikki fyri øll? Nú er ongin neyðug ergoterapi – hvat verður tað næsta? Tað kann ikki vera meiningin, at hesin samfelags-bólkurin ***eisini*** skal berjast fyri sín rætt – rættin til eitt gott lív. Samfelagið, sum sigur seg at vera fyri øll, men eg havi ilt við at síggja hetta. Tosar man við myndugleikarnar, verður tú víst víðari.

Øll renna undan ábyrgd.

Ella, er tað ikki pláss fyri teimum her?

Er tað veruliga so, at tey mugu flyta av landinum, fyri at fáa tað hjálp teimum tørvar?

Undan hvørjum vali eru tey veiku og gomlu gott valagn hjá polikkarunum, men so skjótt tey eru komin inn um tinggátt er alt gloymt. Er hetta ikki misbrúk?

Vit eru ófør at hjálpa neyðstødd uttanlands, og vit eru stolt av hesum. Alt gott um tað. Men hvat við okkara egnu?



Poul Michelsen
*løgtingsmaður*

## Tað mundi verðið so gott – men bleiv so lort!

Fyrst kom Annika Olsen út og segði, at vit ongantíð hava verið so nær eini semju um kommunala reformin sum nú.

So kom Jørgen Niclasen og segði, at Fólkaflokkurin hevði slakað í kravinum um, at fólkaskúlin ikki skuldi leggjast út til kommununnar at umsita. Afturfyri kravdi Fólkaflokkurin, at fólkaatkvøða skuldi vera í teimum ymisku kommununum soleiðis, at ein fólksligt tilgongd varð tryggjað.

So kom Jógvan á Lakjuni og segði, at langt var á mál, og at kravið um fólkaatkvøðu merkir, at tær kommunur, sum ikki vildu leggja saman, heldur ikki skulu leggja saman.

**Fólkaflokkinum líkt, gjørdist totalur forvirringur í leypi av einum fyrraparti.**

Jørgen Niclasen er ofta so taktiskur, at hann sjálvur dettur um sín egna taktikk. Um tað veruliga eydnast honum at sannføra sínar samgonguflokkar um at slaka fyri kravi um, at hvør kommuna sær avger, um hon vil leggja saman ella ikki, so er kommunalreformurin deyður á hesum sinni. Hann er ikki bara deyður – tilgongdin er skotin langt aftur í tíðina.

So vónandi dugir samgongan at gjøgnumskoða avleiðingarnar av kravi Fólkafloksins. So er betur at sleppa ætlanini, soleiðis sum Annika Olsen viðmerkir á Portalinum.

### Fólkaatkvøðan

At fáa ein nýggjan kommunalreform er alneyðugt. Nýggja kommunulógin er tí so yvirornað neyðug og hevur verið ávegis so leingi, at verður talan um fólkaatkvøðu - fyri at tryggja eina fólksliga tilgongd - eigur alt Føroya fólk at sleppa at siga sína meining um lógina.

Tí er tað einasta rætta, at nýggja kommunulógin verður send út til Føroya fólk at atkvøða um. Vinnur lógin frama, skal hon setast í verk – um ikki, so eiga vit at viðurkenna hetta og broyta kommunulógina samsvarandi hesum.